Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Bárður á Lakjuni, løgtingsmaður

Svarari: Ruth Vang, landsstýriskvinna í fíggjarmálum

Evni: Keyp og gjøgnumskygni hjá stjórnarráðum og stovnum landsins

Spurningar:

1. Hvussu nógvar krónur hava stjórnarráðini og stovnar landsins árliga keypt fyri í vørum og tænastum seinastu 3 árini?
2. Hvussu stórur prosentvísur partur av keypunum hesi árini hevur verið í útboði; og kundi tað verið ein størri partur, sum varð boðin út?
3. Hvat vísa hagtølini hvat viðvíkur, hvussu væl tað loysir seg peningaliga at bjóða út?
4. Eru ætlanir um at gera keyp landsins meiri gjøgnumskygd – eisini smærru upphæddirnar?
5. Um ja, hvussu langt er man komin við hesum?

Viðmerkingar:
Hvør spard króna er ein vunnin króna, verður sagt. Sum støðan í almenna húsarhaldinum er í dag við halli á fíggjarlógini og avbjóðingum við langtíðarhaldføri, so er sjálvsagt enn meiri umráðandi og átrokandi, at skattaborgarans peningur verður umsitin á besta og skynsamasta hátt. *"Endamálið er at fáa meira fyri pening skattgjaldarans við at skipa landsins keyp av vørum og tænastum, og samstundis stimbra kappingina á føroyska vøru- og tænastumarknaðinum."* Hetta er endamálsorðingin í rundskrivinum um keyp av vørum og tænastum til stjórnarráðini og stovnar landsins. Hetta er eitt greitt og gott endamál, og spurningurin er so, hvussu tað gongst við at fáa endamálið implementerað í almenna geiran.

Aðalráðini eru 9 í tali, og nógvir eru stovnar landsins, og tí kann hugsast, at nógv verður keypt av ymsum vørum og tænastum. Tað hevði tískil verið áhugavert at sæð, hvussu nógvan pening, talan er um, tá vit hugsa um tær vørur og tænastur, sum eru fevnd av rundskrivinum. Og um tað finnast hagtøl, sum vísa, hvørt tað loysir seg at bjóða út ella ikki. Sum nú er, so er álagt stovnum og ráðum at bjóða út, tá upphæddin er omanfyri 500.000 kr., ímeðan ein tilboðsfyrispurningur skal nýtast fyri keyp upp til 500.000 kr. Keyp undir 50.000 kr. eru undantikin, um ikki rammusáttmálar eru galdandi. Bagatellmørk eru uttan iva fyri, hvat skal bjóðast út, men upp til 500.000 kr. eru rættiliga nógvir pengar hjá nógvum fyritøkum og vinnurekandi. Og at keyp heilt upp í 50.000 kr. púra kunnu vera undantikin, er eisini ein høg upphædd hjá mongum. Áhugavert er eisini at vita, um ætlanir eru at gera skipanina við keypi landsins meiri gjøgnumskygda.

Tískil verða hesir spurningar settir landsstýriskvinnuni í fíggjarmálum.

Á Løgtingi, 18. februar 2025

Bárður á Lakjuni